# Lætt at undirhalda til eitt jóla-borðhald

**– Fók, sum hava jólafrokost eru farin út at hugna sær, og summi hava fingið eitt sindur upp í høvdið. Tí skal ofta lítið til fyri at fáa tey at flenna, sigur Jákup Veyhe, annar av monnunum í Pipari & Salti**

Tað er lætt at fáa respons, tá ið tú undirheldur til eitt jólaborðhald.

Tað heldur Jákup Veyhe, sum er annar av monnunum í Pipari & Salti. Hann hevur mangan roynt at undirhildið fyri fólki, sum hava jólaborðhald, og tað er vanliga ein góð og løtt uppgáva.

– Fólk, sum hava jólafrokost eru farin út at hugna sær, og summi hava fingið eitt sindur upp í høvdið. Tí skal ofta lítið til fyri at fáa tey at flenna, sigur Jákup Veyhe.

– Men tú skalt syrgja fyri at síggjast og hoyrast, tí annars lurta fólk ikki eftir. Um tað eru nógv fólk til ein jólafrokost, so ræður um at hava eina mikrofon og standa undir ljósi – tað nyttar ikki at fara í eitt myrkt horn at spæla stuttligur, sigur hann.

## Lagaliga løtan eftir matin

Tað er ikki líkamikið, nær undirhaldið til eitt jólaborðhald er. Jákup Veyhe heldur, at tann rætta løtan er beint eftir matin.

– Vit hava roynt at undirhildið, áðrenn fólk fekk mat, tí tað var so nógv á skránni til eitt jólaborðhald, men tað riggaði ikki væl. Tað nyttar ikki at undirhalda fyri fólki, áðrenn tey hava fingið at eta. Tí riggar undirhaldið best beint eftir, at fólk hava fingið at eta, sigur hann.

Undirhaldið til eitt jólaborðhald kann vera mangt og hvat, men fólki dámar væl at flenna eftir sær sjálvum.

– Fólk vilja altíð hava okkurt, sum snýr seg um tey sjálvi, og tað plagar at rigga væl at hava við í skemtinum, sigur Jákup Veyhe.


*Tað verður einki Pipar & Salt til jólaborðhaldið í ár. Eftir eina strævna skrá seinastu vikurnar, hava Jákup Veyhe og Sjúrður Skaale gjørt av, at teir fara ikki at undirhalda til jólaborðhald í ár*

## Einki pipar og salt til jólaborðhaldið

Seinastu vikurnar hava teir í Pipari & Salti rættiliga verið í miðdeplinum. Føroyingar elska skemtið hjá teimum, og fólk flokkast til framførslurnar hjá teimum kring landið. Líkamikið um teir spæla í mentanarháborgin í Havn, fyri vinnulívsfólki á vinnudegnum, í Suðuroynni ella Norðoyggjum, so koma fólk í stórum tali til teirra framførslur, og teir flenna í kíki eftir teimum.

Pipar & Salt vóru eisini út til nógv jólaborðhald í fjør, men í ár ætla teir sær ikki at undirhalda í jóla mánaðinum.

– Vit hava havt so nógvar framførslur seinastu tíðina, at vit hava gjørt av ikki at undirhalda til jólaborðhald í ár. Vit hava eina framførslu í Suðuroy í november mánaði, men tað er tað einasta, sum verður á skránni, sigur Jákup Veyhe.







